*Framhald av síðu 11*

um sløgum av kinesiskum mati, har av nakað var suppa. Í Thailandi eru tey ómetaliga góð til at gera suppur. Síðani skulu vit skera í brúdleypskøkuna. Gøj og eg skulu skera tað fyrsta stykkið, sum síðani verður givið til læraran hjá Gøj. Hinir gestirnir fáa síðani hvør sítt stykki.

Meðan etið verður, verður tónleikur spældur. Tvær sangarinnur eru, sum skiftivís syngja. Eisini er Kairoko, sum er sera væl dámt í Thailandi. Um onkur av gestunum heldur, at tann sum er uppi á pallinum dugir væl at syngja, kann viðkomandi fara upp og geva hesum eina peningagávu ella blómur.

Seinni dansa vit thailendskan dans. Eg haldi, at tað er ein sera penur dansur, men eg má viðganga, at eg eri ikki góður til at dansa hann. Mann skal brúka hendurnar nógv og eisini fingrarnar. Í Thailandi kenna tey als ikki til enskan dans, soleiðis sum vit kenna hann.



*Thailendska ferðslumentanin er serlig*

### Vitjan okkara í templinum

Vit vitja í dag templið Boadang, har munkurin Luan Paa Bun heldur til. Í hesum templi er ein stórur liggjandi Budda.

Sjálvt templið liggur langt inni í einari viðalund, men allan vegin inn til templið, koma vit framvið ymiskum áhugaverdum, Vegirnir eru ikki góðir. Teir eru úr grúsi, sum óivað hava fingið skaða, tá regntíðin hevur verið.

Templið er umgirt av einari lítlari rennu. Í hesi rennuni eru smáfiskar. Tað er eitt sindur løgið at koma inn í eitt slíkt tempil. Tað er akkurát sum um har er ein sovorðin friður. Munkurin, sum vit skulu vitja, situr og hevur samrøðu við eina konu og son hennara.

Tá ið tey eru liðug, koma vit nærri. Vit Wai heilsa og gera, sum man ger, tá ið menn eru á vitjan hjá munkum. Munkurin fær eina peningagávu frá okkum, men tá eg handi honum hana, gevur hann mær ein peningaseðil aftur. Eg takki á røttum thailendskum. Seinni gevur hann mær eina Coca Cola. Hetta er ikki vanligur skikkur. Eg fái at vita frá konu mínari, at eg eri sera heppin at fáa henda peningaseðilin. Eg skal goyma hann og um eg nakrantíð fái brúk fyri nøkrum tølum, td. um eg spæli við í lotto, skal eg brúka tølini frá peningaseðlinum, tí tey geva okkum eydnu.

Síðani biður munkurin fyri okkum. Hann biður um, at vit fáa eitt langt og lukkuligt lív, at vit skulu elska hvønn annan og at vit altíð skulu verða saman.

Tann liggjandi Budda, sum er inni í templinum, hevur vegna umvæling av templinum, eitt teppi yvir seg, so vit síggja hann tíverri ikki rættiliga.

Uppi undir loftinum hanga nógvir peningaseðlar. Teir eru rættiliga pent settir fastir uppi undir loftinum í ymiskum mynstrum. Hetta eru pengaseðlar úr størsta partinum av heiminum. Eg eri eitt sindur harmur um, at eg ikki havi ein føroyskan pengaseðil við, tí so er tað fyrsti av tí slagnum her.

Vit fáa ymiskar gávur frá munkinum. Allar gávunar, sum vit fáa, geva okkum eydnu í lívi okkara.

### Heimkoman

Tá ið vit tann 28. desember seta kósina heim aftur til Danmarkar, ferðast vit í 27 tímar innan, vit eru í Århus. Vit eru sera troytt. Tíðarmunin uppá 5 tímar ímillum Thailand og Danmark føla vit fyrst av álvara dagarnar eftir.

Nú tá eg líti aftur á hesa brúðarferð, kann eg ikki annað enn at staðfesta, at hetta gjørdist ein frálík ferð. Ein ferð, sum eg ongantíð í lívi mínum fari at gloyma. Eg havi altíð hildið, at føroyingar, suðuroyingar og ikki minst vágbingar eru heimsins blíðasta fólk, men eg má viðganga, at eg í Thailandi havi møtt blíðari og hjartabetri fólki. Nógv teirra fólk, sum ikki eiga peningaliga nógv virðir, men tey geva meira enn tað sum kann gerast upp í peningi. Tey geva nevniliga hjartarúm, húsarúm og kærleika. Tað er sera kensluborið at siga farvæl til hesi fólk.

Hátturin, sum vit á hesum sinni eru gift á, var eitt satt upplivilsi, ikki minst fyri Gøj. Tað hevur al stóran týdning fyri hana at verða gift á rættan thailendskan hátt. Eg eri eisini glaður fyri, at eg havi havt møguleika at uppliva hetta.

Eftir at vit eru komin heim, eru tað nøkur, sum skemtandi hava hildið fyri, nær vit skulu giftast aftur. Eg havi svarað skemtandi aftur, at vit eru gift í Danmark, har vit búgva í løtuni, vit eru gift í Thailandi, har kona mín kemur frá, og seinni fara vit at gifta okkum í Føroyum, har eg komi frá. Ja, hví ikki tað, kann man spyrja.

Tað, sum er mest áhugavert á hesi ferðini, er sjálvandi at kona mín og eg enn einaferð hava sagt ja til hvønn annan, og at vit at enda fingu okkara brúðarferð.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Halla Nolsøe Poulsen, Washington, fittahalla@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Meir millum himmal og jørð?

Hesar seinastu mánaðirnar havi eg búð í einum gomlum húsum, hjá eini familju, ið næstan aldrin er heima. Tað hevur gingið fínt, eg og mín sambúgvi hava ansað eftir húsunum, gingið túr við hundinum, Otis, og annars bara ansað okkum sjálvum.

Nú ein dagin spurdi sonurin í húsinum meg, um eg visti, at húsið var "haunted", altso at tað spøkti. Tað helt eg meg ikki hava hoyrt, men hann segði, at tað var nakað tey øll vistu. Eg spurdi, hvat prógv hann hevði um tað, og so fortaldi hann mær ymiskt, ið hendi teimum av og á.

Eitt er, at bøkur detta niður av hillunum, sum um onkur stendur og togar tær út við einum fingri. Hetta havi eg ongantíð sæð, men tað segði hann var vanligt. Sjálvur hevði hann tann sama morgunin sitið og lisið í song síni, tá hann kom til at skoyta yvir á kommoduna. Ein skuffa stóð opin, men tað tonkti hann ikki yvir, sjálvt um hann ikki hevði opnað hana sjálvur. Hann las víðari eina góða løtu, og kom so aftur til at skoyta yvir á kommoduna. Nú vóru tríggjar skuffur opnar. Hann hevði ikki sovið, og ongin hevði verið inni í kamarinum. Hann spurdi meg, um eg ongantíð hevði upplivað nakað løgið. Nei, tað hevði eg ikki. Men so alíkavæl. . . Eg kom í tankar um ta náttina, tá eg vaknaði av at onkur var í ganginum uttan fyri mítt kamar. Ljósið var ikki tendrað, tað sá eg undir gáttini, men onkur var heilt greitt í ferð við at róta gjøgnum skuffuna í kommoduni. Eg hugsaði beinanvegin, at tað var ein innbrotstjóvur, og tordi ikki at anda, fyri at hann ikki skuldi hoyra meg. Eftir eina løtu steðgaði skrumlið, og eg bíðaði eftir at hoyra onkran ganga burtur. Tað gjørdi eg bara ikki. Ongi fótafet vóru at hoyra. Tað tók eina góða løtu, men til síðst sovnaði eg aftur. Morgunin eftir spurdi eg húsfólkið, um nakar av teimum hevði verið uppi um náttina, og niðri í kjallaranum. Ongin hevði, og ongin hevði hoyrt nakað. Ongin hevði brotið inn heldur, allar hurðar vóru stongdar.

Um jólini hevði eg vitjan av familju míni. Tey búðu øll heima hjá mær, og vit høvdu tað sera hugnaligt saman. Nýggjársaftan vóru vit á eini "cocktail-cruise" á ánni sum rennur forbí her í Washington. Pyntað sum vit sjálvandi skuldu verða, so hevði systir mín lánt eina ketu við perlum at hava um miðjuna. Tá vit komu heim aftaná ein sera góðan og stuttligan túr, hongdi systir mín ketuna um hondtakið á vesinum hjá mær. Tá eg nakað seinni kom inn á vesið, lá ketan á gólvinum í 6 pettum. Ongin hevði verið inni har, og hon kundi ikki vera dottin niður av sær sjálvum, tí tað er eitt sovorðið knoppa-hondtak, so hon skuldi verið dottin uppum. Ta gátuna loystu vit heldur ongantíð.

Mín tíð her í Washington er at enda komin, og eg má siga, at tað hevur verið eitt tað besta upplivilsið í lívinum. Øll hava verið so fitt og blíð, og eg vóni bara, at eg fái høvi at koma aftur at vitja.

Í íbúðini á Oyrasundi man ikki spøkja tað stóra. Alt hetta eg havi sagt frá kann sjálvandi vera tilvildarligar hendingar. Tað var eisini tilvildarligt, at speglið á vesinum datt niður úr vindeyganum og fór í smildur. Tað var sjálvandi vindurin. Ella var tað?




Coca Cola Cup 2003

Coca-Cola

B68 bjóðar øllum dreingum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini í Runavík 1. og 2. februar 2003

| Aldursbólkar | (Føðiár) |
|---|---|
| Pinkur | (93–94) |
| Gentur 10–12 | (91–92) |
| Smágentur 12–14 | (89–90) |
| Gentur 14–17 | (86–87–88) |
| Pinkulingar | (95–96) |
| Smápiltar | (93–94) |
| Piltar | (91–92) |
| Smádreingir | (89–90) |
| Dreingir | (87–88) |
| Unglingar | (84–85–86) |

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum Gentur 14–17, dreingir og unglingar eru bert 4 leikarar.
Loyvt er at hava ein skiftisleikara.
Luttøkugjaldið er kr. 200 fyri hvørt liðið.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn

Tilmelding hjá:

| | |
|---|---|
| Edmund Jacobsen | 448649 |
| Høgni Hansen | 448274 222209 |
| B68 | 448068 |
| Fax | 449050 |
| E-mail: | b-68@post.olivant.fo |

Seinasta freist at melda til er týsdagin 28. januar.





# Runavíkar býráð
søkir eftir

*Talan er um eina nýggja deild hjá Runavíkar kommunu sum skal setast á stovn. Tað verður uppgáva deildarleiðarans í samstarvið við býráðið at byggja deildina upp frá grundini og at seta út í korti hvussu deildin skal virka og rekast.*

*Talan er um eitt spennandi og mennandi starv í einum dynamiskum umhvørvið har møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.*

*Umsøknir við møguligum viðmælum og prógvum skulu stilast Runavíkar býráð att: Borgarstjórin*
*Um sóknirnar skulu vera okkum í hendi innan 14. februar 2003*



# Leiðara til Sosialu deild.

Við hesum verður søkt eftir leiðara til sosialu deild í Runavíkar kommunu.
Viðkomandi, ið settur verður í starv, skal í høvuðsheitum røkja hesar uppgávur:
Hava dagligu leiðsluna og ábyrgdina av sosialu deild býráðsins, herundir uppbyggja eina góða sosiala fyrisiting.
Verða við til í samstarvi við sosialu nevnd og borgarstjóran at evna politisk og faklig mál innan sosiala økið.
Verða skrivari hjá barnanevndini og í aðrar mátar at samskipa og fyrireika arbeiðið hjá nevndini.
Verða skrivari hjá sosialu nevnd, herundir at fyrireika og samskipa tey mál, sum nevndin hevur til viðgerðar.
Samskipa kommunalu barnaansingina, herundir umsita bíðilistar og annars verða bindilið millum kommununa og kommunalu stovnarnar innan hetta økið.
Hava samskiftið við mynduleikar innan sosial mál og við viðskiftafólk, ið venda sær til kommununa við sosialum spurningum.
Samskipa arbeiðið viðvíkjandi teimum málum innan eldraøki, kommunulækna-, barnatannlæknaskipan sum kommunan umsitur.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur FO-620 Saltangará
Tel. 417000 Fax 417001
E-mail: runavik@runavik.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin á Løgmannabreyt**

Stovnurin liggur væl fyri í einum øki í støðugum vøkstri við nógvum barnafamiljum, barnavinarligum og náttúruríkum umhvørvi.

Í Dagstovninum á Løgmannabreyt koma at ganga 60 børn.

Stovnurin verður skipaður við 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari og 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari.

Á stovninum koma at starvast umleið 12 fólk.

www.torshavn.fo

## Pedagogar til Dagstovnin á Løgmannabreyt

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogum til nýggja Dagstovnin á Løgmannabreyt.

**Størvini**
Talan er um 1 varaleiðarastarv og 3-4 pedagogstørv, 30-40 tímar um vikuna í barnagarðsstovunum og 3-4 pedagogstørv, 30-40 tímar um vikuna til vøggustovurnar.

**Vit bjóða**
fleiri áhugaverd størv, har tit saman við leiðaranum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin, seta starvsfólk og byggja upp eitt pedagogiskt umhvørvi í støðugari menning.

**Vit ynskja**
at tann ið settur verður, skal vera røkin, nærlagdur og álítandi, hava góð samstarvsevni, og kunna taka ábyrgd. Tú skalt, saman við hinum starvsfólkunum, vera við til at geva børnunum ein mennandi gerandisdag við umsorgan, tryggleika og avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Varaleiðarastarvið verður sett 15. mars 2003 og pedagogstørvini 1. apríl 2003 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sofíu Nattestad, leiðara, tlf. 225782 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 17. Februar 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogar á Løgmannabreyt".



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin á Hamrinum**

Í Dagstovninum á Hamrinum koma at ganga 60 børn.

Stovnurin verður skipaður við 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari og 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari.

Á stovninum koma at starvast umleið 12 fólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

www.torshavn.fo

## Pedagogar til Dagstovnin á Hamrinum

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogum til nýggja Dagstovnin á Hamrinum.

**Størvini**
Talan er um 1 varaleiðarastarv og 3-4 pedagogstørv, 30-40 tímar um vikuna til barnagarðsstovurnar og 3-4 pedagogstørv, 30-40 tímar um vikuna til vøggustovurnar.

**Vit bjóða**
Fleiri áhugaverd størv, har tit saman við leiðaranum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin. Seta starvsfólk og byggja upp eitt pedagogiskt umhvørvi í støðugari menning.

**Vit ynskja at tú**
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.
- ert røkin og álítandi, hevur góð samstarvsevni, og kanst taka ábyrgd.
- sært møguleikar og avbjóðingar, sum liggja í nærumhvørvinum á Hamrinum.

**Setanarviðurskifti**
Varaleiðarastarvið verður sett 1. mai 2003 og pedagogstørvini 15. mai 2003 ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Elisabeth Henriksen, leiðara, tlf. 225784 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 17. februar 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogar á Hamrinum".